UTTAN ÚR HEIMI

## Vilja friða hval

Myndugleikarnir í Avstralia ætla nú at skipa so fyri, at sildreki verður friðaður fyri allari veiði í øllum heimsins høvum, samstundis sum ætlanin er at skipa serligar friðingarleiðir í Kyrrahavinum fyri onnur hvalasløg.

Avstralia hevur fleiri ferðir fyrr roynt at fáa altjóða hvalaveiðinevndina IWC at friða sildreka, men málið hevur ongantíð vunnið frama har. Nú roynir stjórnin ístaðin málið ígjøgnum Bonn-samtyktina um hótt og ferðandi djórasløg. Væntandi verður málið viðgjørt einaferð síðst í hesum mánaðinum.

80 lond hava skrivað undir Bonn-samtyktina. Teirra millum er Noreg, sum rekur vinnuliga sildrekaveiðu, og sum skilst hava norsku myndugleikarnir longu orðað eitt svar til avstralska uppskotið.

Nógvir norðmenn halda tað vera løgið, at Avstralia loyvir sær at virka fyri at friða hval, samstundis sum landið sýtir fyri at staðfesta Kyoto-sáttmálan. Avstralia er tað landið í heiminum, sum samanborið við fólkatalið hevur tað størsta CO2-útlátið.

## Omar er á lívi

Arabiska sjónvarpsstøðin Al-Jazeera, sum fleiri ferðir hevur almannakunngjørt upptøkur við Osama bin Laden, sigur nú, at hon hevur fingið eitt bræv, sum fyrrverandi andaligi leiðarin hjá Taliban, mullah Omar, hevur skrivað. Brævið var dagfest tann 11. september.

Í brævinum skrivar Omar, at kríggið í Afghanistan fer at halda fram, til landið aftur er frælst, og islsmska læran aftur verður sett í gildi í skúlunum.

Hetta er fyrsta lívsteknið frá mullah Omar í langa tíð, men afghanski forsetin, Hamid Karzai, segði so seint sum í síðstu viku, at hann er sannførdur um, at Omar er á lívi.

## Høgrameiriluti í Noregi

Var stórtingsval í Noregi nú, høvdu Framburðsflokkurin og Høgri fingið so nógvar atkvøður, at teir kundu skipa stjórn einsamallir. Teir báðir flokkarnir høvdu fingið 88 av teimum 165 stórtingslimunum.

Eftir einari kanning, sum varð almannakunngjørd í gjár, hevði Framburðsflokkurin fingið 27,4 prosent av atkvøðunum og Høgri 21,1 prosent.

Arbeiðaraflokkurin hevði harafturímóti bert fingið 18,5 prosent ímóti 21,4 prosentum á valinum seinast. Lítið mætari gongst flokkinum hjá Kjell Magne Bondevik, forsætisráðharra. Kristiligi Fólkaflokkurin fekk á seinasta vali 12,4 prosent, men eftir teirri nýggju kanningini hevði hann bert fingið 7,6 prosent nú.

## Lítlibeiggi skal skiljast

Neil Bush, yngsti bróður amerikanska forsetan George W. Bush, skal skiljast frá konuni Sharon.

Sambært blaðnum Houston Chronicle hevur Neil Bush boðað rættinum frá, at hann vil sleppa burtur úr hjúnarlagnum. Sambært blaðnum skal Neil Bush hava greitt rættinum frá, at tey bæði eru so ósamd, at tað nyttar einki at halda fram.

Neil og Sharon Bush eiga tvær døtur og ein son.

# Irak fingið knívin á barkan

**Tað mundi kennast sum lætti hjá nógvum ríkis- og stjórnarleiðarum á ST-aðalfundinum, tá amerikanski forsetin, George W. Bush, lovaði, at USA fer at samstarva við ST í Irak-málinum.**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*



Men amerikanski forsetin lat ongan av fundarluttakarunum vera í iva um, hvat USA heldur um Irak, og hvussu verandi støða skal broytast ella loysast, sum amerikanska stjórnin kallar tað.

– Framferðin hjá Irak er ein hóttan fyri ST og ein hóttan fyri heimsfriðin. Tey seinastu tíggju árini hevur Irak sýtt fyri at laga seg eftir samtyktunum hjá heimsfelagsskapinum. Allur heimurin skal nú standa sína roynd, og ST noyðist at taka eina stóra avgerð. Skulu samtyktirnar hjá ST, sum trygdarráðið ger, virðast og setast í gildi, ella skulu tær ongan týdning hava? Skal ST ongan týdning hava, ella skal felagsskapurin liva upp til sjálva hugsjónina aftan fyri felagsskapin, spurdi amerikanski forsetin í røðu síni á aðalfundinum.

### Og hann legði afturat:

– USA hevur ta støðu, at ST skal vera virkið, og at ST skal hava virðing. Okkara støða er, at samtyktirnar hjá heimsfelagsskapinum skulu virðast og haldast. USA fer at samstarva við ST um okkara felags avbjóðing, sum er Irak. Halda leiðararnir í Irak fram við at seta seg upp ímóti okkum, noyðist heimurin at lata Irak fáa ábyrgdina at kenna, segði George W. Bush.

### Saknaðu prógv

Hann segði, at umheimurin hevur roynt at fáa Saddam Hussein at beina fyri sínum hópoyðingarvápnum, men at hann beint tvørturímóti kravinum hevur gjørt uppaftur meiri vápn. Bush legði afturat, at Irak helt fram at gera hópoyðingarvápn, meðan vápnaeftirlitsmenninir hjá ST vóru í landinum, og hann spurdi, um Saddam Hussein mundi steðga framleiðsluni, tá eftirlitsmenninir fóru úr landinum.

– Okkara størsti vandi er, at yvirgangsmenn kunnu fremja ágang fyri at røkka sínum málum við hópoyðingarvápnum frá einum lógleysum stýri. Í dag er tað bara eitt land, har hesin vandi er til staðar, og tað er Irak, segði amerikanski forsetin í røðuni.

Vesturlendskir diplomatar í New York siga, at røðan hjá amerikanska forsetanum var sera greið, og at forsetin lat ongan vera í iva um, at USA ætlar sær ikki at sita hendur í favn. Fleiri politikarar á aðalfundinum søgdu tað sama um røðuna, men teir saknaðu prógv fyri, at Irak veruliga hevur tey hópoyðingarvápnini, sum USA sigur landið hava.

ST-aðslskrivarin, Kofi Annan, sum helt røðu beint undan George W. Bush, ávaraði USA ímóti at taka Irak-málið í egnar heldur. Í einari sera álvarssamari røðu segði Annan, at øll lond hava rætt til sjálvverju, verða tey álopin. Men einki land hevur rætt til at taka egin stig, sum kunnu hótta heimsfriðin. Slíkum málum skal ST taka sær av, segði aðalskrivarin og sipaði beinleiðis til álopsætlanina hjá amerikansku stjórnini uttan tó at nevna hana ella USA.

Irakski ST-sendiharrin helt sum vera man lítið um røðuna hjá Bush. Mohammed Aldouri, sendiharri segði, at meginparturin av røðuni var tann beri heilaspuni, og at endamálið hjá amerikanska forsetanum var at fáa heimin at gloyma stríðið millum Ísrael og palestinar.

# Endaspurtur í Svøríki

**Í gjár fóru svensku politikararnir undir sjálvan endaspurtin upp undir ríkisdagsvalið í morgin. Alt bendir á eitt sera spennandi val.**

SVENSKA VALIÐ
*Árni Joensen*

Í gjár tordi neyvan nakar svii at siga, hvør fer at vinna ríkisdagsvalið í morgin, tí munurin millum teir báðar partarnar er so lítil, at tað kann fara báðar vegir.

Gøran Persson, forsætisráðharri hevur valt at vitja fleiri býir nú í ednanum á valstríðnum í einari seinastu roynd at venda gongdini, sum seinastu tíðina hevur gingið tann skeiva vegin hjá sosialdemokratunum.

Men heldur ikki teir borgarligu kenna seg tryggar, og teir hava eisini tann trupulleika, at ósemja tykist vera um, hvør av floksformonnunum skal verða forsætisráðharri, vinna teir valið. Ein kanning í Aftonbladet í gjár vísti, at góð 31 prosent av teimum borgarligu veljarunum vilja hava Lars Lejonborg, 30 prosent vilja hava Alf Svenson, 25 prosent Bo Lundgren og 13 prosent Maud Olafson.

Men tað størsta stríðið er um teir seinastu veljararnar, sum framvegis ikki vita, hvar tey fara at seta krossin. Sambært teimum seinastu kanningunum hava meiri enn 600.000 sviar framvegis ikki gjørt av, hvønn tey fara at velja í morgin.



# Íblástur úr Isle of Man

**Bara tríggjar vikur áðrenn fíggjarlógin fyri 2003 skal leggjast fram, fer Fíggjarnevndin í løgtinginum til lágskattalandið Isle of Man at hyggja at teirra skipan, har vanligi skattgjaldarin ongantíð skal gjalda meira enn ein fimtapart í skatti.**

SKATTAPARADÍS
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Fíggjarnevndin í løgtinginum fer leygardagin á kunningarferð til bretsku oynna Isle of Man. Endamálið við ferðini er at kunna seg um skattaskipanina á oynni, sum liggur millum Ongland og Írland. Fíggjarnevndin skal m.a. vitja ídnaðar- og handilsráðharran á Isle of Man, umframt at nevndin skal vitja fíggjarnevndina á oynni. Vertur fyri vitjanina er formaðurin í tinginum á Isle of Man, sum nevnist Tynwald.

### Lágur skattur

Hóast lønarlagið er á leið tað sama sum í Føroyum er skattatrýstið eitt heilt annað á Isle of Man. Marginalskatturin er 18 prosent, og arbeitt verður við at fáa hetta tal niður á 15 prosent. Harumframt skulu fólk gjalda ein annan skatt, nevndan "national insurance", sum er umleið seks prosent. Botnfrádrátturin er 10.000 £, uml. 120.000 krónur um árið, av inntøku millum 10.000 £ og 20.000 £ skulu gjaldast 10 prosent í skatti, og síðan skulu gjaldast 18 prosent í skatti av inntøkuni, sum liggur omanfyri 20.000 £, tvs. uml. 240.000 krónur. Er talan um hjún, har bara annað arbeiðir, eru botnfrádráttirnir dupult so stórir, tvs. at annar hjúnarfelagin kann forvinna 20.000 £ skattafrítt um árið.

### Optimera inntøkurnar

Á odda fyri føroyska ferðalagnum er Óli Breckmann, formaður í Fíggjarnevndini. Hann metir, at føroyingar kunnu læra nógv av skipanini á Isle of Man. Fíggjarnevndin skal hava fund við sínar starvsbrøður á Isle of Man, sum skulu greiða frá, hvaðan teirra landskassi fær sínar inntøkur til vega, og hvussu inntøkurnar verða býtta millum ymsu útreiðsluøkini.

– Stóri spurningurin er, hvussu fært tú mest burtur úr tínum inntøkum, uttan at skatturin skal hækka, sigur Óli Breckmann og vísir á, at t.d. verður í løtuni bygt eitt nýtt sjúkrahús á oynni, sum fer at kosta á leið tvær milliardir krónur, og sum tað almenna fíggjar.

### Kunnu læra av Isle of Man

Óli Breckmann sigur, at ferðin fyrst og fremst er ein kunningarferð, men at endamálið eisini er, at tað skal síggjast aftur á føroyskum fíggjarlógum tey næstu árini, at Fíggjarnevndin hevur verið henda túrin. Ella sagt við øðrum orðum: at føroyski skattastigin skal broytast og skatturin skal lækka.

– Tað kann ikki vera rætt, at ein handverkari í Føroyum skal gjalda 60 prosent í skatti av síni síðst forvunnu krónu, tað er rán á alljósum degi, sigur Óli Breckmann. Sum dømi vísir hann á, at fólk í Føroyum við meðal inntøku gjalda útvið helvtina í skatti, meðan ein persónur á Isle of Man við eini inntøku uppá 450.000 sleppur við at gjalda ein fimting í skatti og "national insurance".

Ferðin hjá Fíggjarnevndini, sum hevur ein búskaparfrøðing og ein skrivara við sær, til Isle of Man, kostar 100.000 krónur. Óli Breckmann metir, at hesin peningur er væl givin út.

- Vónandi kunnu vit læra nakað av teirra skipan, og fáa íblástur til, hvussu okkara skipan kann broytast, so meira fæst burturúr samfelagsliga við lægri skattatrýsti enn vit hava í Føroyum í dag, sigur Óli Breckmann.

# Løgreglan á Skipasmiðjuni

**Løgreglan hevur verið á Tórshavnar Skipasmiðju og tosað við fólk, ið ikki nýta hjálm til arbeiðis, soleiðis sum annars er álagt teimum**

ARBEIÐSTRYGD

Eftir áheitan frá Arbeiðseftirlitinum hevur løgreglan verið og tosað við arbeiðsfólk á Tórshavnar Skipasmiðju, sum ikki ganga undir krøvini um trygd á arbeiðsplássinum.

Talan er um nakrar mans, sum sambært Arbeiðseftirlitinum ikki nýttu hjálm, tá Arbeiðseftirlitið var á staðnum, upplýsir vakthavandi á politistøðini í Havn.

Fráboðan varð send fútanum, sum lat hana víðari til løgregluna at taka sær av.

Tosað er við menninar, og síðan verður fráboðan send fútanum og Arbeiðseftirlitinum, áðrenn gjørt vertður av, hvat víðari hendir.

Gunnar Mohr, stjóri á Tórshavnar Skipasmiðju, sigur, at hann veit ikki av, at løgreglan hevur verið har, men fegnast um, at tað verður gjørt.

– Tað er í fínasta lagi, at løgreglan roynir at fáa fólk at skilja álvaran í at tryggja seg, tá vit ikki klára at gera tað, sigur hann í stuttari viðmerking.

**ej**

*framhald frá síðu 4*

høvdu ynskt var í bygdini?

Kanska Pizzaria, eitt tilhaldahús, og at SÍF-húsi opnaði aftur var svarið. Hondbóltur og fótbóltur eru, men tað eru ikki øll í tíma tað.

Tó vóru ikki øll fúr Sandavági, men eisini kom onkur var úr Miðvági.

Spurt var um tey ikki gjørdu okkurt fyri tað sjálvi, ella tey bara bíðaðu til onkur annar gjørdi tað fyri tey ? Og tá hildu tey at best var at bíða.

Tá ið tunnilin letur upp, fara tit so til Havnar í dans? vildu vit vita.

*– Ja tað ætla vit okkum, kanska í biograf, at arbeiða ella okkurt annað.*

Tað eru nógv fleiri møguleikar í miðstaðar økinum enn her, siga tey, men um tað fer at kosta ov nógv so verða vit verandi her heima.

Fara tit at rýma frá oynni?

*– Nei, tað ætla vit okkum ikki at gera, vóru øll nokso sikkur uppá.*

Drongur, ið kom frá Miðvági, helt at í Miðvági var einki at gera, so púra einki lív í. So hann kemur til Sandavágs at hitta ungdóm her. Tey høvdu eisini hugsað sær at tað oftari var dansur her vesturi.

Fara tit ikki í dans på Bryggen ?

*– Nei, tað er til tey tilkomun. Var onkur skjótur at svara.*




**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr**. P/F 2216, P/F Føroya Fiskavirking, 100 Tórshavn.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Petur Even Djurhuus, N. Mohrsgøta 7, 188 Hoyvík.

*Skráseting Føroya tann 12. september 2002*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2832, Sp/f Tera, 600 Saltangará.

**Viðtøkur broyttar:** 20.06.2002.
**Nevnd:**
**Innkomin í nevndina:** Fritleif Olsen, 640 Rituvík (formaður) og Hans Jacob Ellingsgaard, 600 Saltangará.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av einum nevndarlimi ella stjóra.

*Skráseting Føroya tann 12. september 2002*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag móttikið fusiónsætlan samsv. § 134 a í P/F- lógini:**

**A. Navn:** Sp/f Hallberg (Sp/f-nr. 600), 600 Saltangará.

**Og**

**B. Navn:** Sp/f Miðberg (Sp/f-nr. 2784), 600 Saltangará.
C.

Harumframt hava vit móttikið váttan frá metingarmanninum samsv. § 134 c, stk. 4 í P/F-lógini.

*Skráseting Føroya tann 13. september 2002*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 1102, Sp/f Ýti, 800 Tvøroyri.

**Nevnd:**
**Farin frá sum formaður:** Jákup Jacobsen, 800 Tvøroyri.
**Farin úr nevndini:** Sverri Jørvør Magni Jacobsen, 800 Tvøroyri.
**Innkomin í nevndina:** Dávid Jacobsen, 800 Tvøroyri.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Sverri Jørvør Magni Jacobsen, 800 Tvøroyri.
**Innkomin sum stjóri:** Jákup Jacobsen, 800 Tvøroyri.

*Skráseting Føroya tann 12. september 2002*

*Kristin Balle*

Lesið Sosialin

www.sosialurin.fo